## Krabbamein av radarum

Ein kanning, sum felagsskapurin Kræftens Bekæmpelse hevur gjørt, vísir, at menn, sum arbeiddu á radarstøðunum hjá donsku verjuni í árunum frá 1960 til 1986, hava verið undir ávirkan, sum kann elva til krabbamein. Evnið varð umrøtt í sjónvarpssending fyri fimm árum síðani, og tá gjørdu 136 menn vart við seg. Felags fyri teir var, at allir høvdu arbeitt við radarum, og at allir høvdu fingið krabbamein. Týskland hevur somu royndir, sigur DR.



*Nógvir menn, sum hava arbeitt á donskum radarstøðum, hava fingið krabbamein*

*(Mynd: DR)*

# Kommunurnar til Karsten



*Karsten Hansen*

**Fíggjarmálaráðharrin skal nú hava betri møguleikar fyri neyvt at fylgja við í, hvussu gongdin í leiklutinum hjá kommununum í búskapinum verður**

NÝTT LANDSSTÝRI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað er søga, at landsstýrið tosar við tveimum tungum, tá ið tað ræður um kommunurnar. Seinastu árini hevur landsstýrismaðurin í innlendismálum havt ábyrgdina av kommununum, meðan landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur havt ábyrgdina av samlaðu fíggjarligu gongdini og harvið av, hvussu kommunurnar hava lagt til rættis í rakstri og íløgum.

Nú er liðugt við hesum. Nýggju samgonguflokkarnir hava gjørt av, at kommunumál nú burturav skulu umsitast av landsstýrismanninum í fíggjarmálum og harvið í fíggjarmálaráðnum.

Fyri ikki so langari tíð síðani segði Magni Laksáfoss, landsstýrismaður í fíggjarmálum, at tað var neyðug at seta tiltøk í verk, tí kommunurnar høvdu alt ov stórt hall í uppskotunum til fíggjarætlan fyri 2008, sum tær høvdu sent til landsstýrið. Tað helt landsstýrismaðurin í innlendismálum, Heðin Zachariasen, ikki, og harvið tosaði landsstýrið við tveimum tungum, og so varð einki gjørt við tað, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum metti vera neyðugt at gera.

Undir samgongusamráðingunum var semja um, at tað nú er neyðugt, at landsstýrið tosar við einari tungu, og at tað skal vera røddin í fíggjarmálaráðnum, sum skal tala. Tá ið Eilif Samuelsen var landsstýrismaður í kommunumálum 1994-98, stýrdi hann rættuliga neyvt møguleikunum hjá kommununum at taka lán. Meginreglan, sum var uttan undantak, segði, at tað ikki bar til hjá einari kommunu at hava størri skuld enn eina álíkning.

Tá ið Karsten Hansen var landsstýrismaður í fíggjarmálum 1998-2004, hevði hann nógvar samráðingar við kommunurnar um íløgur og rakstur og lánsbyrðar.

### Skattastigin

Í samgongusamráðingunum hevur verið viðgjørt, um broytingar skulu gerast í skattastiganum hjá kommununum. Galdandi skipan er soleiðis, at skattastigin hjá landinum er progressivur, meðan kommunuskatturin er proportionalur. Tað vil siga, at meðan hægru inntøkurnar rinda lutfalsliga meiri í landsskatti, so rinda allar inntøkur sama prosent í kommunuskatti.

Seinnu árini hevur politikkurin hjá øllum samgongum verið, at alt fleiri uppgávur skulu flytast frá landinum og til kommunurnar at umsita. Harvið verður skattagrundarlagið undir vælferðartænastunum meiri proportionalt og minni progressivt. Tað sær nýggja samgongan at vera minni samhaldsfast, enn tað hevur verið, og tí verður lagt upp til, at progressivitetur skal fáast inn í kommunuskattin.

Dømi um málsøki, sum er lagt til kommunurnar at taka sær av, er barnaansingin. Tað verður eisini tosað um eldraøkið og um fólkaskúlan.

Í valstríðnum gingu nógvir flokkar inn fyri, at kommunurnar einsamallar skulu hava ábyrgdina av fólkaskúlanum. Tað er tó ivasamt, um henda samgongan fer at leggja fólkaskúlan út til kommunurnar, tí bæði Javnaðarflokkurin og Miðflokkurin søgdu seg í valstríðnum vera ímóti tí ætlanini. Báðir flokkarnir søgdu seg ganga inn fyri, at fólkaskúlin verður lagdur til landið at umstita.

# Strammari stýring av kommununum

NÝTT LANDSSTÝRI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Samgonguskjalið millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldið og Miðflokkin hevur greiðar ásetingar um, at neyvari eftirlit skal vera við fíggjarviðurskiftunum hjá kommununum. Undir »Fíggjar- og búskaparmal« í samgonguskjalinum stendur m. a.:

»Gjørdar verða yvirskipaðar broytingar í fíggjar- og búskaparpolitikkinum, sum eisini fevna um kommunala búskapin.

Miðað verður eftir jøvnum og haldførum vøkstri og langtíðarjavnvág í búskapinum. Lagt verður upp fyri sveiggjum, sum henda í búskapinum, bæði av innlendis og útlendis ávum.

Málið er at skipa ein sjálvberandi og óheftan búskap við langtíðarætlanum, sum støðugt fyrireikar samfelagið til bygnaðarligar broytingar innanhýsis og til krøv í altjóða búskapinum og á altjóða marknaðinum.

Til tess at røkka málinum verða hesi stig tikin: Játtanarskipan landsins verður endurskoðað, langtíðarfíggjarætlanir verða gjørdar fyri rakstur og løgur, fullfíggjað hagtalsgrundarlag verður fingið til vega, tjóðarroknskapurin verður dagførdur sambært OECD-leisti, búskapargrunnur Føroya verður stovnaður, bindndi avtalur verða árliga gjørdar ímillum land og kommunur um íløgu- og rakstrarkarm, felags fíggjarstýring og roknskaparreglur verða skipaðar fyri land og kommunur, altjóða skulu stovnar gera regluligar dygdarmetingar av føroyska búskapinum, og funktiónirnar fyri fíggjarstýring og tænastur hjá tí almenna verða samskipaðar.

### Skattur, avgjøld og útjavning

Skattaskipanin er ov einstáttað, og skattagrundarlagið skal breiðkast. Progressiviteturin í skattinum er fallandi orsakað av, at parturin hjá kommununum av almenna búskapinum og tænastunum økist, samstundis sum avgjaldsparturin økist í mun til skattapartin av landsins inntøkum.

Tí skal skattaskipanin endurskoðast við tí endamáli, at heildin í skatta- og avgjaldspolitikkinum verður meira progressiv, sjúkrakassa- og kringvarpsgjaldið verða løgd inn í skattaskipanina, kapitalvinningsskattalógin verður endurskoðað til tess at steðga óætlaðum avleiðingum, og MVG-løggávan og trotabúgvalóggávan verða endurskoðaðar.«

*(brot úr samgonguskjalinum)*